# Trúvirðið hjá Taks

HEÐIN D. POULSEN



**Søgan um ein almennan stovn, ið noktar at fylgja avgerðunum hjá eftirlitsmyndugleikanum**

Á heystið 2006 kom Skatta- og avgjaldskærunevndin til eina greiða niðurstøðu og gav Taks boð um, hvat teir skuldu gera í tí ávísa málinum og í øllum líknandi málum. Nú hálvtannað ár seinni noktar Taks framvegis at fylgja avgerðini hjá Kærunevndini, ið er hægsti fyrisitingarligi myndugleiki.

Eg havi verið partur av hesum máli, síðani eg heitti á Taks, um at rinda aftur tað mvg'ið, sum teir sambært Kærunevndini uttan lógarheimild høvdu kravt inn.

**Eftirrationalisering**
Í fyrstuni var grundgevingin tann, at málið var lagt til dómsvaldið til støðutakan. Hesa grundgeving góðtók Kærunevndin ikki, tí so leingi eingin dómur fyriliggur, so skal Taks fylgja avgerðunum hjá Kærunevndini. Nú metir Taks seg ikki kunna rinda, tí tað er eitt mál millum bilasølurnar og keyparin, altso, at bilasølurnar skulu rinda tað ólógliga innkravda mvg'ið til bilkeyparin. Hetta er jú fulkomuliga burturvið, tí mvg er eitt avgjald sum verður umsitið sambært lóg, og er tað luturin hjá Taks at umsita hetta sambært galdandi lóg.

**Ignorerar hægsta fyrisitingarliga myndugleika**
At Taks sum almennur stovnur hevur eina aðra løgfrøðiliga áskoðan enn eftirlitsmyndugleikin og leggur málið til dómsvaldið, er einki eindømi.

Tað, sum er ræðandi, er, at Taks ignorerar avgerðina hjá Kærunevndini, sum greitt staðfestir, at "*Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur tikið eina avgerð, og so leingi, sum henda ikki er broytt við dómi, er rættarstøðan, sum nevndin er komin til, galdandi. Taks má fylgja avgerðunum hjá nevndini...*"

**Goyma upplýsingar fyri borgaranum**
Eitt annað, sum ger hetta málið enn meira álvarsamt, er, at í síni síðstu avgerð sigur Taks seg *ikki hava tær ítøkiligu upplýsingarnar um tað goldna mvg'ið av skrásetingargjaldinum, tá tað snýr seg um sølu millum bilasølu og teirra viðskiftafólk*.

Hetta er ein reingjan av sannleikanum, tí Taks hevur teir fíggjarligu upplýsingarnar um hvønn einstakan bil, og eru hesir einfalt atkomuligir í teirra telduskipan.

**Hvar er tann politiski myndugleikin?**
Viðgerðin av hesum máli er á markinum til tað absurda, og samstundis sum Landsstýrismaðurin í Fíggjarmálum langar út eftir almennum stovnsleiðarum í øðrum málsøkjum, so letur hann hetta óskilið halda áfram í sínum egna ráðið.

Spurningurin er so, um Landsstýrismaðurin í Fíggjarmálum fer at sópa fyri egnar dy,r ella fer hann einki at gera við hetta álvarsmál, har rættartrygdin hjá tí borgaranum verður sett í vanda?

# 100 árahaldið hjá Tvøroyrar kirkju

JÓNSVEIN BECH



**Viðmerking til Jóhann Mortensen**

Til svarið frá Jóhann Mortensen til mín í vikuskiftinum skal eg viðganga, at eg havi ikki lisið tíðindastubban frá útvarpinum í vikuskiftinum, og hvat tíðindasendingunum viðvíkur, lurti eg sum oftast bara eftir tíðindasendingunum á middegi og um kvøldið. Har havi eg ikki hoyrt nevnt nakað um nevnda tiltak, uttan eina kunngerð frá Tvøroyrar kirkju mikudagin. Havi spurt onnur um hetta sama, og hava tey heldur ikki lagt merki til tað.

Møguliga hevur tað verið nevnt í øðrum av tíðindasendingunum igjøgnum dagin. Og um so er, at eg her havi gjørt tykkum órætt, vil eg hervið treytaleyst biðja um eina umbering fyri tað.

Kanska hava vit verið úti í ov góðari tíð, tá tiltakið og fyribilsskrá vóru lýst á Suðuroyarportalinum longu í februarmánaði. Men tá vit hava lagt til merkis, at tíðindi úr Suðuroy í útvarpi og sjónvarpi sum oftast stava haðani, mettu vit tað vera kunning nokk. Men har hava vit óivað mett skeivt.

Men tað er ikki hetta sum er tað avgerandi fyri okkum í hesum málinum. Ongin av okkum hevur droymt um, at útvarpið ella sjónvarpið fóru at gera nakað burturúr øllum tiltøkunum, sum skipað var fyri í hesum sambandi.

Men tað harmar okkum, at ikki høvuðstiltakið, hátíðargudstænastan í Tvøroyrar kirkju Kristi Himmalferðardag kundi verða send í einum av fjølmiðlunum. Og hana visti í hvussu so er útvarpið um næstan ein mánað áðrenn. So hana kundu tit sent, um áhugi var fyri tí. Og kenni eg starvsfelagar mínar rætt, hevði eingin av teimum havt nakað ímóti at vikið plássið, fyri at tað hevði kunnað latið seg gjørt, um so skuldi verið neyðugt.

Gudstænastan í Tvøroyrar kirkju liggur fast kl. 11 sunnumorgun. Og var tað tí náttúrligt, at hon eisini gjørdi tað henda dagin. Og hon verður heldur ikki flutt, fyri at t. d. ein teknikari hjá útvarpinum skal hava møguleika at koma aftur og fram sama dag, um tað í framtíðini skuldi verið ynski um at senda eina gudstænastu úr Tvøroyrar kirkju. Tað sama er eisini galdandi hinar kirkjurnar í prestagjaldinum. Annað og meira liggur ikki í seinastu viðmerkingini.

# Tíðin er farin frá fanatiskum lokalpolitikki

DÁVID ISFELD



At síggja og hoyra ein relativt nýggjan landspolitikara tvíhalda um eittans politiskt mál, sum Gerhard Lognberg ger í løtuni, er skuffandi, eftir, at vit í Føroyum loksins hava gjørt Føroyar til eitt valdømi.

Henda avgerð, at gera Føroyar til eitt valdømi, skuldi m.a. vera við til at menna samstarvið millum okkara politikarar og sostatt eisini effektivitetin í føroyskum politikki – effektivur politikkur kostar einfalt skattgjaldarunum minni pengar, og skapar eisini eitt betri politiskt huglag og arbeiðsviðurskifti, og tískil eisini betri politiskar semjir og avtalir, til frama fyri allar føroyingar.

Winston Churchill segði einaferð: "A fanatic is one who can't change his mind and won't change the subject" – umsett: "Ein fanatikari er ein, ið ikki fær broytt sína meining og ikki vil skifta evnið". Hetta minnir harmiliga nógv um støðuna og atburðin hjá Gerhardi Lognberg í hesum døgum. Hann kennir seg óivað sum eina lús millum tvær negl, men soleiðis er ofta tá ein er landspolitikari – eg havi samkenslu við hansara tvístøðu, men eri ikki samsintur viðvíkjandi hansara niðurstøðu.

Ein politikari kann ikki bera seg at í landspolitikki, sum hann ger heima ella millum síni avbygdafólk. Sjálvsagt merkir tað ikki, at ein kann hava eina meining privat og eina mótstríðandi meining politiskt, men tað merkir, at ein má sína politiskt hegni – diplomati – og hava eina raðfesting, sum ikki er ófrávíkilig. Tað er vanligt, at ein politikari hevur eitt hjartamál, men bert at sýna áhuga fyri eittans máli er meira sjáldsamt – og óheppi – tí har, ið bert eitt mál og ein áhugi er, sum ber av øllum, kann eingin raðfesting vera og sostatt einki rúm fyri diplomatiskum virksemi.

Óivað saman við mongum øðrum føroyingum, eri eg troyttur av at hoyra um og uppliva okkara umboð á Tinginum bera seg tápuligt at. Tað kann einfalt ikki passa, at politikarir, sum hugsa seg væl um, kunnu meina, at tað hevur størri týdning at gera ein undirsjóvartunnil til eina oyggj, sum longu hevur ferðasamband til miðstaðarøki, enn at uppdatera skúlar, sum trongdu til bata áðrenn Gamlarætt varð gjørd.

Er fatanin hjá øllum sandoyingum tann, at so leingi ferðahættir eru til, sum teir ikki hava, so skulu hesir hættir fáast til vega? Teir fingu jú ferjulegu og skip fyri uml. 500 milliónir kr., meðan Studentaskúlin í Hoydølum og Tekniski skúlin í Tórshavn í sama tíðarskeiði trongdi til nýggj høli. Og nú skulu teir hava tunnil, hóast hesir skúlar framvegis ikki hava fingið nýggj høli. Skulu teir so eisini hava flogvøll aftan á undirsjóvartunnilin er gjørdur, áðrenn sandoyingar unna skúlunum nýggj høli?

Nei, sandoyingarnir hava fingið; nú skulu skúlarnir fáa fyrst. Hetta er ikki ein spurningur um vit antin gera ein skúlamiðdepil ella undirsjóvartunnil, men ein spurningur um raðfesting – hvat gera vit fyrst? Hvat kann bíða? Hvat hevur størstan samfelagsligan týdning? Hvat hava vit ráð til nú? Hvørji árin fær slík avgerð? O.s.fr.

Um ein politikari ikki dugir ella tímir at seta sær slíkar spurningar, fyri at gera sær eina skilagóða niðurstøðu, er viðkomandi ikki nóg nærlagdur og ábyrgdarfullur – blint trúfesti til ein veljaraskara er ikki gott trúfesti. Tá er ein bert útynnari hjá lokalum fanatikarum. Logiskt og rationelt tankavriksemi, og síðani vísdóm og skynsemi í útynning, er dýrabarasti eginleikin hjá einum politikara – um hetta vantar má strembast eftir tí, eins og góði handverkarin leggur seg eftir at greiða arbeiði skjótt og væl úr hondum. Ein politikari hevur eisini ábyrgd at nýta politiska handverkið fyri at greiða sítt arbeiði væl úr hondum.

Tá eitt av kærastu rakstrarrópunum hjá politikarunum síðstu tíðina hevur verið, at Føroyar skal gerast eitt vitanarsamfelag, so haldi eg sanniliga tíðin er komin at seta handling aftan fyri (rakstrar)orðini. Miðnámsskúlarnir eru hornasteinarnir fyri ungdóm, ið vil byggja land – hvør betur samfelagslíøga enn tann, at byggja nýggjar, rúmligar og tíðarhóskandi skúlar. Um vit vilja afturgongd og misrøkja okkara unga tilfeingi, skulu vit bert halda á fram við at bora tunnlar og ikki útbúgva okkara stigtakandi ungdóm á virðiligan hátt.

Tá tað bert verður bora og ikki bygt, enda vit við at vera noydd at búgva í hesum myrku holum, sum tær moldvørpur vit eru. At hava "tunnel vision", sum bretar siga, er ikki sameiniligt við eitt vitanarsamfelag.

Við vón um betri skúlar

Lesið Sosialin - so eru tit við